

## *Felags páska-stevna á Kambsdali*

*Aftur í ár verða páskastevnur hildnar kring landið. Í Eysturoynni er hesaferð avgjørt, at hava eina felags stevnu í høllini á Kambsdali.*

Stevnan byrjar páskaaftan 23. apríl og endar 2. páskadag 25. apríl. Møti vera hvørt kvøld klokkan 19, har Hanus á Gørðum, Andreas Andreasen og Torleif Johannesen fara at tala.

Evnið fyri páskastevnuna í ár er eitt av seinastu orðum Jesusar á krossinum, tá ið hann sigur: "Tað er fullgjørt!". Nógvar sangframførslur verða eisini á møtunum, og fara tvey kór ella kór og einstaklingur at framføra á hvørjum av møtunum. Talan er um KFUM&K kórið, Taborkórið, Bethaniakórið, Glyvrakórið, Manskórið í Thabor og Tórhild Bjarkhamar.

Á páskastevnuni verður eisini eitt stórt ungdómstiltak við lovsangsløtu páskaaftan, eins og eitt stórt familjumøti seinnapartin páskadag fyri alla oynna.

Felagstiltak fyri alla oynna

Tað eru missiónsarbeiðini í Eysturoy, sum skipa fyri páskastevnuni á Kambsdali. Í ár hava tað serliga verið arbeiðini í Fuglafirði, Leirvík og í Gøtu, sum skipa fyri. Í fjør var stevnan í Runavík og í fyrraári á Skála.

Eins og hini árini, byrjar páskastevnan ikki fyrr enn páskaaftan, tí so hava missiónshúsini í Eysturoy høvi at hava staðbundin møti skírisdag og langa fríggjadag, um tey ynskja tað. Men frá páskaaftan til annan páskadag vera eingi møti í teimum staðbundnu missiónshúsunum í Eysturoy, men ístaðin savnast øll á Kambsdali til felagstiltøkini hár.

# Í klønum tráð




»Onki er liðugt fyrrenn alt er liðugt«

## Í MORGIN

**3/6 °C**



3-8 m/s | 5-10 m/s

Gul tiil stívt andøvsgul av landsynningi, seinnapartin minni vidur av útsynningi. Sólglottar, men eisini okkurt ælið og hitin millum 7 og 10 stig.

## FRÍGGJADAGIN

**6/9 °C**



10-15 m/s | 10-15 m/s

Stívt andøvsgul upp í hvassann vind av suðri, seinnapartin sami vindur av útsynningi. Ælingur, men eisini sólglottar og hitin millum 5 og 8 stig.

## LEYGARDAGIN

**7/10 °C**



1-6 m/s | 1-6 m/s

Lot av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Hann veksur vindin upp í hvassan vind av útsynningi og suðri og stundum regn. Hitin millum 3 og 7 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 970 hPa. í landsynning úr Hvarvinum fer í landnyrðing. Brúgvaløgini í útsynning úr Føroyum koma hendavegin.




**Komandi nátt:**
Lágtrýstið eystan fyri Hvarvið stendur mestsum í stað og brúgvaløgini við Føroyar fara í landnyrðing.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 132 mm

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nuuk** | -9 | **Tromsø** | -1 | **Moskva** | -13 | **Athen** | 14 |
| **Reykjavík** | 8 | **Bergen** | -2 | **Berlin** | -6 | **Beijing** | 11 |
| **Tórshavn** | 7 | **Oslo** | -9 | **Paris** | 3 | **New Dehli** | 20 |
| **Lerwick** | 4 | **Stokkhólm** | -6 | **Madrid** | 15 | **Bangkok** | 32 |
| **Aberdeen** | 7 | **Keypmannah.** | -4 | **Róm** | 11 | **Sydney** | -- |
| **London** | 8 | **Helsinki** | -19 | **Malorca** | 15 | **New York** | 2 |



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

## VESTFALLSKYRRINDI

19. mars — Mánin næstur jørðini
26. mars — Seinna kvarter
2. apríl — Mánin longst frá jørðini
3. apríl — Tendring

Kelda. Álmanakkin 2011

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 30. mars | 04:47 | 17:07 | 03:47 | 16:07 | 04:02 | 16:22 | 06:47 | 19:07 | 07:47 | 20:07 | 03:02 | 15:22 | 02:02 | 14:22 | 05:02 | 17:22 | 06:02 | 18:22 | 04:32 | 16:52 | 05:47 | 18:07 |
| 31. mars | 05:26 | 17:46 | 04:26 | 16:46 | 04:41 | 17:01 | 07:26 | 19:46 | 08:26 | 20:46 | 03:41 | 16:01 | 02:41 | 15:01 | 05:41 | 18:01 | 06:41 | 19:01 | 05:11 | 17:31 | 06:26 | 18:46 |
| 1. apr | 06:04 | 18:23 | 05:04 | 17:23 | 05:19 | 17:38 | 08:04 | 20:23 | 09:04 | 21:23 | 04:19 | 16:38 | 03:19 | 15:38 | 06:19 | 18:38 | 07:19 | 19:38 | 05:49 | 18:08 | 07:04 | 19:23 |
| 2. apr | 06:43 | 19:04 | 05:43 | 18:04 | 05:58 | 18:19 | 08:43 | 21:04 | 09:43 | 22:04 | 04:58 | 17:19 | 03:58 | 16:19 | 06:58 | 19:19 | 07:58 | 20:19 | 06:28 | 18:49 | 07:43 | 20:04 |
| 3. apr | 07:22 | 19:41 | 06:22 | 18:41 | 06:37 | 18:56 | 09:22 | 21:41 | 10:22 | 22:41 | 05:37 | 17:56 | 04:37 | 16:56 | 07:37 | 19:56 | 08:37 | 20:56 | 07:07 | 19:26 | 08:22 | 20:41 |